Helgi L. Petersen gav landsliðsavboð herfyri, og hann tykist sera ivasamur undan stórdystinum í Runavík

NSÍ-HB:

Í fjør telir ikki

Finalistarnir frá í fjør hittast í Runavík, men tann dystin tykist hvørgin parturin hugsa um í dag

UPPTAKT
Jákup Mørk

Tað verður ein endurtøka av steypafinaluni í fjør, tá HB vitjar í Runavík sunnudagin. Ein steypafinala, ið sum kunnugt endaði við sigri til NSÍ, og í so máta hava havnarmenninir kanska nakað at hevna.

Tá tosað verður við umboð fyri liðini bæði, er tað tó ikki hetta, sum liggur fremst í huganum. Í øllum førum ikki, tá prátað verður Jens Martin Knudsen, sum avgjørt má teljast millum royndastu leikararnar í landinum.

- Eg vil ikki siga, at vit hugsa so nógv um finaluna í fjør. Men tað er klárt, at HB vanliga er eitt lið, sum kemur langt í steypakappingini, so skalt tú vinna hesa, so rennur tú teg nokk í HB fyrr ella seinna. Tí er tað kanska líka so gott, at vit nú fáa teir á heimavølli.

Um liðið veit Jens Martin at siga, at teir eru á leið so væl fyri, sum tilber. Ivamál er um, hvussu stendur til við fótliðinum hjá Helga L. Petersen, men í aðrar mátar eru allir mans tøkir, og so er spurningurin, hvussu langt hetta røkkur.

Hugsar um teir tøku

Heldur ikki í HB eru stórvegis trupulleikar av skaðum. Tað er vís, at Martin Christiansen, sum kom til felagið undan hesum árinum, ikki verður við, tí hann framvegis dregist við skaða, men harumframt er bert ivamál um Nico Dugaru. Rumenski miðvallarin dregist við ein vøddaskaða, men hann hevur so runnið í vikuni, og so er spurningurin, hvussu støðan er sunnudagin.

Venjarin hjá HB, frank Skytte, heldur í øllum førum ikki, at teir skulu lata so illa at.

- Viðvíkjandi skaðum, so er tað slíkt, sum kann henda í einum ári, og enn hava vit so ikki verið meira enn vanliga hart raktir.

- Annars havi eg vanliga tann hugburðin, at eg ikki vil nýta orkuna at hugsa um teir leikarar, sum eru skaddir, men heldur um teir, sum eru tøkir, og her haldi eg, at vit standa heilt væl. Ikki minst er tað gleðiligt, at mest sum nýggja venjan hevur staðið seg so væl, sum hon hevur gjørt, heldur hann.

Um dystin sjálvan, metir Frank annars, at hesin sjálvsagt verður trupul.

- Øll ætla sær jú altíð at vinna, so tað verður truplult. Men eg haldi, at vit standa væl saman í løtuni. Vit hava reist okkum, eftir at vit eitt skifti vóru í heilt álvarsligum trupulleikum í bólkakappselinum, og ferðin til Íslands var sera góð venjing hjá okkum, og vónandi kann tað geva bonus.

EB-Streymur-B36:

Gamlir kenningar hittast

Stórur partur av felagsliðnum hevur onkursvegna eina fortíð í B36, og tað ger ikki spenningin minni, at EB/Streymur higartil hevur verið stóra positiva yvirraskilsið í steypakappingini



Ronnie Samuelsen er ein av fleiri í EB/Streyma-leguni, sum hevur ein fortíð í B36

UPPTAKT
Jákup Mørk

Tað er einki at siga til, at fótbóltsfepurin er høgur á Eiði og har um leiðir í hesum døgum.

Eftir at felagsliðið nú í tvey ár hevur hvat eina nóg so trupla tilveru í bestu deildini, tykjast ljósari dagar nú at standa fyri frammán. Í steypakappingini varð liðið fremst í sínum bólki, framman fyri bæði KÍ og VB, og nú verður tað so ein av FM-favorittunum, nevniliga B36, sum kemur á vitjan í fjórðingsfinaluni.

Einki er at siga til, at hetta eisini økir um spenningin hjá leikarunum, men har eru eisini onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi. Ikki minst tann sannroynd, at tað í øtuni er ein lítil herur av monnum í EB/Streymi, sum onkursvegna áður hava havt við árstalsfelagið í Havn at gera.

Ein teirra er Egil í Bø, og hann sigur seg gleða seg til dystin sunnudagin.

- Tað sigur seg sjálvt, at hetta er ein spennandi uppgáva. Ikki minst nú tað hevur gingið so væl. Í øllum førum eru fólk kring felagið ógvuliga spent, nú uppgávan er somiki stór.

Til dystin sigur Egil annars, at teir hava mest sum alt fólkið tókt. Einasta ivamálið er Ingi Hansen, sum hevur drigist við ein skaða.

Takk og farvæl

Hjá B36 eru somuleiðis mest sum allir mans tøkir. Undantøkini eru Jens Kristian Hansen og Bárður Mortansson, sum báðir hava verið skaddir í longri tíð, men í aðrar mátar tykist talan verðu um sama liðið, sum spældi seinastu dystirnar í bólkaspælinum.

B36 mundi annars senda nakrar vinarligar tankar til Vágs, tá EB/Streymur í seinastu sekundunum bjargaði sær javnleik í Vági og harvið staðfesti víðari luttøkuna hjá B36. Sjálvt á heimasíðuni varð ein tøkk send, men nú er so eftir øllum at døma líðugt við hesum.

- Sjálvandi siga vit takk fyri hjálpina, men fyri tað er tað í øllum førum ætlanin, at tað verða vit, sum koma víðari, heldur Jákup á Borg, tá vit royna at fregnast um hugburðin til dystin.

- Men tað verður truplult. Teir hava verið sera væl koyrandi í ár, so vit rokna á ongan hátt við nakrari lættari uppgávu. Heldur tvørtur ímóti, staðfestir Jákup at enda.

GÍ-FS Vágar:

Popczynski dámar einki at vera favorittur

GÍ venjarin hevur í vikuni brúkt nógva tíð at tosa ungu menninar heilt niður á jørðina, nú teir ivaleyst verða mettir at vera størstu favorittarnir í fjórðingsfinaluni

GÍ-venjaranum dámar lítið, at ungu menn hansara skulu roknast sum upplagdir favorittar ímóti uppflytarunum úr Vágoynni

UPPTAKT
Jóannes Hansen

GÍ fær í morgin vitjan av FS Vágum. Ivaleyst eru tey mong, sum undan fjórðingsfinaluni rokna gøtumenn sum mest upplagdu luttakararnar í hálvfinalu umfarinum. Tað órógvar GÍ venjaran, Krzystof Popczynski.

– Vit hava staðið okkum betri í bólkaumfarinum, enn eg hevði torað at rokna við. B36 og HB verða av mongum mett sum mest upplagdu boðini at vinna landskappingina, og bæði liðini hava nógvar góðar spælarar. Men kortini eydnaðist tað okkum at vinna bólkaumfarið. Tí hava vit heimavøll ímóti FS Vágum, og tað eri eg sjálvandi væl nøgdur við.

Men er tað so ikki akkurát eftir bókini, at tit eru favorittar í fjórðingsfinaluni?

– Eg eri ikki so vísur í, at liðið hjá okkum megnar at vera støðugt. Vit hava nógvar ungar spælarar á liðnum, og ofta vísir tað seg, at ungir spælarar eru óstøðugir. Serliga í Føroyum havi eg lagt til merkis, at tá ið tað í einum ella tveimum dystum hevur gingið einum liði væl, so er vandin stórur fyri, at teir ikki eru so væl uppsettir í næsta dystinum. Tað er hetta, sum eg havi brúkt nógva tíð til í vikuni. At siga mínum spælarum, at teir ikki vinna ímóti FS Vágum, um teir ikki eru eitt hundrað prosent uppsettir. Talan er bara um ein dyst, og tað gerst ikki umaftur, um tað kiksar í morgin. So tað er einki sum eitur, eru orðini hjá GÍ venjaranum sum seinnapartin í dag fer á Svangaskarð at fregnast. Annan sunnudag fara hann og GÍ í fyrsta umfarinum í landskappingini at fáa vitjan av KÍ, sum spælir á Toftum í dag.

Hjá GÍ varð Poul Ennigarð nú eitt kvøldið skaddur undir venjing, og Popczynski roknar ikki við, at hann verður førur fyri at spæla tær báðar næstu vikurnar.

Hjá FS Vágum er tað rættuliga ivasamt, um brasilski verjuspælarin, Alexander Silva, verður førur fyri at spæla. Hann hevur ikki vant síðstu dagarnar, tí hann er skaðaplágaður. Annars eru allir FSV spælararnir tøkir.

FS Vágar hevur áður staðið seg væl í Gøtu, og teir vístu í bólkaumfarinum á útivølli ímóti NSÍ, at tað er ikki ógrundað, tá ið teir í Vágum hava ætlanir um at vera við, har tað gongur fyri seg.

Einki er at ivast í, at pf. Vágatunnulin fer at hava ein góðan dag í morgin, tí tey verða ikki so fá, sum fara undir Vestmannasund og til Gøtu við FSV.

Klárar til DM

Kvinnurnar í rútmiskum fimleiki hjá Havnar Fimleikafelag eru farnar til Danmarkar at luttaka í DM sum gestaluttakarar.

Gentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag vunnu stórkappingina, og harvið rættin at taka lut í DM-kappingini

FIMLEIKUR
tíðindaskriv

Tá ið kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag stóðu sum vinnarar av Stórkappingini 2003, var tað við einari ótrúligari stórari gleði, størri enn vanligt, tí tær høvdu nú møguleikan at luttaka í DM í rútmiskum fimleiki, ein stór avbjóðing hjá kvinnunum.

Kvinnurnar vóru ikki leingi um at taka endaligu avgerðina, at tær ætlaðu sær at luttaka í hesi kapping, hóast hetta "bert" var sum gestalið.

Kvinnurnar í rútmiskum fimleiki, hjá Havnar Fimleikafelag, vunnu sum sagt Stórkappingina 2003, sum var hildin í Kambsdali í mars mánaði.

Partur av vinninginum var møguleikin at luttaka í Danmarksmeistaraskapinum í rútmiskum fimleiki, sum gestalið.

Tá ið tað tíðliga í fimleikaárinum varð kunngjørt, at í ár skuldi vinnarin av Stórkappingini hjá kvinnunum sleppa at royna seg í DM í rútmiskum fimleiki, gjørdist áhugin, sjálv sagt bara uppaftur størri at venja. Og tá ið so løtan upprann at tað var Havnar Fimleikafelag sum gjørdist vinnarin av hesum heiðrinum annað árið á rað, ja tá fekk gleðin ongan enda.

Kvinnurnar vóru ikki leingi um at taka endaligu avgerðina, at tær ætlaðu sær at luttaka í hesi kapping, hóast hetta "bert" var sum gestalið.

Nógvar fyrireikingar hava verið og kvinnurnar hava vant nógv, so tá farið var av farstøðini hósmorgunin vóru vónirnar tilstaðar, hóast eingi nevndi tað.

Hvar og nær er kappingin

Kappingin kemur at ganga fyri seg í Påruphallerne í Odense og kappingin verður sunnudagin 4. mai, kl. 14.00 danska tíð. Kappingin er fyri tey allarbestu og liðini kvinnurnar koma at kappast ímóti eru 6 ítali. Hesi 6 liðini hava kvalifisera seg víðari frá sínum kappingum, eins og okkara hava kvalifisera seg víðari, við at vinna kappingina í herheima.

Kappast verður í einari fríðari seriu og einari við hondamboðum, bóltum. Okkara kvinnur gera seinast í báðum ídkaðunum.

Hvussu eru vónirnar

Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag, vóru ífjør gestaluttakarar í DM í rútmiskum fimleiki, og gjørdu tær ikki minni bragd, enn at vinna kappingina. So vónirnar burdu verið góðar. Men tað er ilt at spáa um hvussu kemur at gangast kvinnunum, tí eingin av okkum kennur nakað til liðini sum tær skulu kappast ímóti, og fyri so vítt kenna vit heldur ikki støðið á hinum liðunum. Vit kunna bara ynskja teimum góðan eydnu og spent bíðar til úrslitið fyriliggur. Spennandi verður íhvørtfall.

Takka stuðlunum

Felagið og kvinnurnar ynskja at takka, SP/F Høgna Mikkelsen, Brdr. Schlie´s Fiskeeksport, P/F Bowling, Føroya Sparikassa, Radiohandilin, Bilasølan Øssur Johannesen, Cafe Natur, Kalli, Steen Lorenzen, Hjá Fróða, Føroya Fimleikasambandinum og Stuðlafelagnum hjá Havnar Fimleikafelag fyri allan stuðul ið tit hava veitt, uttan hann bar als ikki til.

Broytt veddingarlóggáva

Afturberingin av veddingarpengum í Føroyum verður nú beinleiðis knýtt at, hvat veddingin kastar av sær í Føroyum

ÍTRÓTTARVEDDING
tíðindaskriv

Hósdagin 3. apríl hevði Sp/F Ítróttarvedding ársaðalfund.

Í síni frágreiðing frá virkseminum í farna ári greiddi nevndarformaðurin, Torfinn Højgaard, m.a. frá, at Sp/F Ítróttarvedding hevði gjørt nýggjan sáttmála við Dansk Tipstjeneste á vári 2002. Sambært hesum sáttmála kundu skavispøl seljast í Føroyum, og eru tey nú at fáa í handlunum.

Í vetur hevur danska skattamálaráðið tó gjørt av at broyta donsku tipslógina. Hetta inniber, at parturin hjá Føroyum framyvir ikki verður tengdur at vinninginum hjá Dansk Tipstjeneste, men at afturberingin til Føroya verður beinleiðis knýtt at tí úrsliti, sum spælið kastar av sær í Føroyum.

Tað er eysæð, at nýggja skipanin fer at seta størri krøv til marknaðarføringina av spølum í Føroyum. Í hesum sambandi fer Sp/F Ítróttarvedding at hava ein virknari leiklut enn áður.

Spennandi verður at síggja, hvussu nýggja skipanin fer at roynast.

Nevndarformaðurin Torfinn Højgaard handaði á aðalfundinum umboðum fyri Ítróttasamband Føroya, Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðnum kekkar við upphæddunum, ið vórðu tillutaðar í ár. Ítróttasamband Føroya fekk 3,99 mió. kr., Føroya Ungdómsráð fekk 1,33 mió. kr. og Mentamálaráðið fekk 1,33 mió. kr.

Nevndarval var eisini á skránni. Nevndin var øll afturvald og skipaði seg eftir fundin. Nevndarlimirnir eru hesir:

Torfinn Højgaard, formaður
Sigmund Poulsen, næstformaður
Hans Petur Joensen
Petur Elias Petersen
Heðin Mortensen
Jan Dam Vang
Sørin Pram Sørensen

Torfinn Højgaard handar her Andreu Eldevig vegna Føroya Ungdómsráð kekk